

## Meiri løn hóast hall

Hóast blóðreyð tøl á niðastu linju og vánalig útlit fyri 2010, kann nevndarformaðurin í danska reiðaríinum, Torm, Niels Erik Nielsen, hála eina størri løn inn á konto sína fyri arbeiðið í reiðaríinum. Hann fær í alt 289.000 dollarar, savarandi til 1,6 milliónir krónur fyri nevndarformanspostin, sæst í ársroknskapinum hjá Torm fyri 2009. Tað svarar til eina árliga lønarøking á meiri enn 40%. Í 2008 fekk formaðurin, sum er meðeigari í advokatfyritøkuni, Bech-Bruun, 206.000 dollarar, ella 1,1 millión krónur í løn fyri nevndararbeiði sítt í Torm. Í alt er samsýningin til nevndina heilar 1060 milliónir dollarar í 2009 móti 871.000 dollarar í 2008. Eisini samsýningin til advokatfyritøkuna hjá Niels Erik Nielsen, Bech-Bruun, er økt, og var í 2009 300.000 dollarar, sum er smáar 1,7 milliónir krónur, fyri løgfrøðiliga hjálp, skrivar danska blaðið Børsen.

# Partroling hjá lemmatr

**Bæði Fiskiveiðieftirlitið og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eru ikki sørt í døpurhuga, nú fýra lemmatrolarar eru farnir at partrola eftir upsa á somu leiðum sum aðrir partrolarar. – Eg haldi, at hetta órógvar meiri, enn gott er, sigur Jacob Vestergaard. Reiðari sigur, at teir gera bara tað, sum loyvini geva teimum heimild til, men ásannar, at hetta sjálvandi ikki er haldbart í longdini**



*Beinissvørð (mynd) og Eydna eru nú farnir at partrola eftir upsa, og nú fara eisini Sjagaklettur og Vesturleiki at partrola. Hin "grái", sum eisini hómast fremst á myndini, kann eftir øllum at døma einki gera við hesa veiði, tí lógin er ikki nóg fullfíggjað á hesum øki*

TROLVEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá Fiskimálaráðið gav lemmatrolaranum Eydnu royndarloyvi at partrola, var ætlanin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum ikki, at fleiri skip av hesi støddini skuldu leggjast á upsastovnin innanfyri fiskidagaringin, sum hann verður róptur.

Teir, sum eiga Eydnu, funnu sær ein makkara, og hesin gjørdist lemmatrolarin Beinissvørð.

Nú eru so eisini Sjagaklettur og Vesturleiki, sum øll árini hava trolað hvør sær, farnir at partrola.

### 365 fiskidagar

Sosialurin er í vikuni uppringdur av monnum, sum argast um, at hesi skip nú liggja og partrola eftir upsa millum aðrar ísfiskatrolarar.

Lemmatrolararnir eru ikki við í fiskidagaskipanini, og kunnu tí fyri tann skuld fiska í 365 dagar um árið.

- Vit hava vent okkum til Fiskiveiðieftirlitið og hava spurt, um teir ikki hava heimild til at taka hesi skip og ákæra tey fyri ólógliga veiði, men svarið er, at tað kann eftirlitið ikki. Lógin er ikki nóg fullfíggjað, og tí kunnu hesi skip ikki takast og sektast fyri brot á fiskiveiðiskipanina.

Hetta sigur maður, sum siglir við einum av okkara ísfiskatrolarum, og sum á seinasta túri upplivdi, at Eydna og Beinissvørð fiskaðu upsa millum aðrar partrolarar.

### Órógvandi støða

Líkt er til, at bæði Fiskiveiðieftirlitið og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eru ikki sørt í døpurhuga, nú fýra lemmatrolarar eru farnir at partrola eftir upsa á somu leiðum sum aðrir partrolarar.

Landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard, dylur ikki fyri, at gongdin er órógvandi og heldur ikki, at støðan er haldbar.

- Vit hava gjørt eitt uppskot fyri umleið 14 døgum síðan, har lemmatrolararnir í fyrsta lagi koma upp í fiskidagaskipanina við sínum avmarkingum í dagatali. Her verða eisini ásetingar og avmarkingar um veiði eftir bæði upsa, kongafiski, blálongu, stinglaksi og eisini gulllaksi, sigur hann.

Jacob Vestergaard sigur, at spurningurin, sum hevur tikið seg upp um, at lógin um vinnuligan fiskiskap ikki er nóg fullfíggjað, tá ræður um lemmatrolararnar, er til viðgerðar í Fiskimálaráðnum í løtuni.

- At einki er í lógini, sum forðar lemmatrolarum í at partrola, er nýtt fyri okkum, leggur hann aftrat.

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært kanningum, sum gjørdar eru av partroli í mun til lemmatroli, fæst ikki meiri fiskur við partroli, men her er peningur at spara í olju og øðrum útreiðslum.

- Tí skuldi partroling hjá hesum skipum ikki økt um trýstið á upsastovnin, sigur Jacob Vestergaard.

### Lóglig ránsveiða

Fiskimaðurin, sum vendi sær til Sosialin í gjár, heldur, at talan er um lógliga ránsveiði hjá hesum stóru trolarum, sum nú eru farnir at partrola uttan avmarkingar – og eftir øllum at døma við heimild í lógini.

- Upsaveiðan verður søgd at vera burðardygg, men við hesi royndini aftrat man vera ivasamt, hvussu burðardygg veiðan verður. Eg haldi, at politiska skipanin í stundini átti at gjørt nakað við hetta mál, soleiðis at vit ikki seinni standa sum ryssa yvir deyðum fyli.

Fiskimaðurin heldur tað vera ov vánaligt, at hann sum vanligur eygleiðari skal noyðast at langa so hart út, tá vit skuldu havt eina politiska skipan og eitt fiskiveiðieftirlit, sum átti at tikið sær av slíkum máli.

- Eitt annað, sum eisini spælir inn, nú hesi skip eru farin at partrola á júst somu leiðum sum vit, er, at tað hugsandi eisini verður uppaftur truplari at sleppa av við upsan. Á seinasta túri noyddust vit at bíða við at koma inn til landing, hóast skipið var fult undir lúkurnar. So, hetta kann eisini í aðrar mátar hava avleiðingar

> *... vit hava gjørt eitt uppskot, har lemmatrolarar í fyrsta lagi koma upp í fiskidagaskipanina við sínum avmarkingum í dagatali..."*
>
> *(Jacob Vestergaard)*



*- Hetta er órógvandi, og vit hava tikið málið upp í Fiskimálaráðnum, sigur landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard*